# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stóra høgtíðin

Páskir eru tann týdningarmesta kristna høgtíðin og verða Páskir hildnar til minnis um Kristi deyða og uppreisn frá deyðum. Páskir eru fyrsta sunnudag eftir fyrsta fullmána eftir vár javndøgur. Sjálvt heitið Páskir stavar frá jødisku hátíðini pesach, ið er til minnis um ferðina út úr Egyptalandi. Páskir eru sum nevnt hin størsta hátíðin hjá kristna heiminum, har vit minnast Jesu líðing og deyða á krossinum fyri okkara syndir. Søgan um Jesus, Guds son, sum gjørdist menniskja eins og vit vanligu menniskju, hansara líðing og deyða, er ein grim og ræðulig søga, sum samstundis ímyndar eina livandi vón teirra kristnu við tí gleðiboðskapi, sum henda søga fyrst og fremst snýr seg um. Páskir eru tískil ikki bert eitt dapurt minni um nakrar ræðuligar hendingar í Jerusalem fyri meira enn tvey túsund árum síðan. Páskirnar skulu eisini minna okkum á ein mestsum ófatiligan gleðiboðskap, sum stendur okkum øllum menniskjum í boði og sum gjørdist veruleiki páskamorgun.

Á Páskum eins og við aðrar stórar høgtíðir er ríkligt høvi at hugsa um tilveruna og umhugsa, hvørt vit nú bera okkum at, sum tað sømir seg kristnari tjóð. Føroyingar eru eins og onnur menniskju ymiskir og hava ymsar átrúnaðarligar áskoðanir. Vit hava lyndi til at blanda politikk og átrúnað saman. Hetta er sum kunnugt ikki eitt serføroyskt fyribrigdi, men er at finna í øllum londum, har átrúnaður stendur sterkur í fólkinum. Hetta er sjáldan til gagns fyri fólkaræðið, sum í sínum grundvølli er og eigur at vera sekulert. Har átrúnaðarlig sjónarmið mynda eitt flokspolitiskt støði hevur hetta lyndi til at ganga út yvir tolsemið og átrúnaðarligir flokkar hava lyndi til at gerast fanatiskir og óvikiligir - mestsum blindir og deyvir fyri sjónarmiðunum hjá øðrum politiskum flokkum og áskoðanum. Menniskjað fyrst – síðan kristin, segði Grundtvig, ið hevur havt sera stóran týdning um øll Norðurlond. Kanska skuldu vit øll tikið í egnan barm og havt hesi fyndarorð eitt sindur meira í huga í gerandisdegi okkara.

Vit liva í eini tíð og í eini mentan, har tað tykist, sum tað ræður um at hava rætt, um at jarðleggja mótstøðupartin í verbalum ella politiskum orrustum, har vit støðugt eru í vanda fyri at gloyma tað menniskjansliga og tað medmenniskjanliga. Vit síggja bert mótstandarin, vit síggja ikki menniskjað. Tað knípur við virðing, evnum og vilja at síggja mál og spurningar frá ymsum síðum. Hetta er tíverri alt ov vanligt í almenna orðaskiftinum og áttu vit øll at hugsa um hetta og at tikið eitt tak fyri at bøta um tónan í almenna rúminum, tað veri seg á tingi, í fjølmiðlunum ella manna millum. Hetta hevði helst gagnað fólkaræðinum og okkum øllum, eitt nú við, at mong, ið heilt einfalt ikki troysta sær at taka lut í almenna orðaskiftinum, tí tónin er so bonskur, høvdu komið á vøllin. Tað eigur at kunna bera til at vera djúpt ósamdur og samstundis hava virðing fyri tí persóni, ið ein er ósamdur við. Hetta er ein alment viðurkend demokratisk fortreyt og skuldi væl eisini verið ein kristinplikt. Við ynskinum um eini góð Páskir fyri allar føroyingar.

**Sosialurin**

# Fjallmaður á ovastu og ytstu rók

TÓRBJØRN JACOBSEN



Ein fjallmaður hjá gjáarmonnum, í Sáttarenni, er vorðin danskur ríkisleiðari. Tað verður man ikki av ongum, og sessurin arvast ikki. Bara egnar dygdir, eitt bjart høvd, óvanlig orka, úthaldni, ráksnúgvni og ein máttmikil sosialur intelligensur kunnu manøvrera ein mann ella eina kvinnu í ein so týðandi sess, at stjórna einum sjálvstøðugum demokratiskum stati. Lars Løkke Rasmussen er harvið ikki hvør sum helst. Hann er ikki bara ein mátaligur 44 ára gamal danskur juristur, sum av tilvild er endaður í forsætismálaráðnum. Hóast fjølmiðlarnir hava roynt tað dýrasta, teir hava verið mentir, ivaleyst við góðari hjálp frá eiðsvornum sníkum í umsitingini og andstøðuni, at stoyta hann útav niðaru rókini, í fíggjarmálaráðnum, eydnaðist hetta ikki.

So selektivur og í heildarmyndini rangvørgur var tíðindaflutningurin ta einu tíðina, at mong vóru farin at halda, at maðurin ikki tók sær til annað, enn at sita á ølstovum og fylla sær upp í nevið, meðan pollamjørkin av cigarettosanum sveið í eygunum á vinum og kenningum. Hetta hendi, samstundis sum maðurin var høvuðsarkitektin handan fleiri av størstu umbótingunum, ið eru framdar í danska samfelagnum í nýggjari tíð, eitt nú kommunalreformurin. Tey flestu spyrja helst, hví føroyingar hava áhuga fyri hesum valdsskiftinum í Danmørk og um Føroyar onkursvegna kunnu vera orsøkin til brádliga nationala undanhaldið hjá Anders Fogh Rasmussen.

Kanska eru Føroyar meginorsøkin til, at skiftið kom júst nú, har Løkke tók stafettina frá Fogh. Hvønn týdning Sólrun hevur í hesum sambandinum, er ilt at meta um hjá okkum, ið eru stødd uttansyndis húskið teirra, men geopolitiski veruleikin í norðurhøvum, har danska imperie framvegis hevur takhold á hjálondunum Grønlandi og Føroyum, er saman við proamerikanska danska politikkinum, í mun til lemjandi stríðið í Iraq, helst meginorsøkin til, at vesturlendski verjufelagsskapurin NATO valdi nú fráfarna danska forsætisráðharran til sín ovasta leiðara. Ongin ivast tó í hansara dugnasemi, og vit, sum hóast politiskar ósemjur hava baksast við hann í Fólkatinginum í áravís, hava mist ein beinharðan og professionellan sparringspartnara. Nú verður spennandi at síggja hvussu eftirmaðurin fer at speireka flogsfelagan hjá Sigurði Joensen, lrs., sála og Jákupi Petersen, kirurgi, táið Høgni Hoydal fer undir spurnarríðina, í royndini at knúlva seg tværtur ígjøgnum uppfunnar imperialistiskar durðakarmar á Christiansborg, sum Foghurin plagdi málbera seg.

Danir høvdu aftur tørv á einum menniskja á ovastu rók. Fólk troyttast av yvirmenniskjansligari attitýdu, óvanligum stílveikla og perfektionismu. Skipanin hevur av og á tørv á, at verða hálað niður á jørðina aftur. Eftir Kampmann og Krag høvdu danir tørv á einum arbeiðara í landsins evsta sessi, sum øll onkursvegna kundu identifisera seg við. Hvørja meting fólk annars hava um politikk hansara, so broytti Anker Jørgensen mentala radaran, soleiðis, at politiska skipanin lendi aftur úr eini alt meira akademiskari/teknokratiskari sferu. Búktalarin hjá Lykketoft, Poul Nyrup Rasmussen og Anders Fogh Rasmussen líktust tveimum Geppetto figurum og nú hevði danska tjóðin aftur tørv á einum meira jovialum fýri, og Løkke stóð í solar plexus, táið lagnan vildi tað. Tíðin er als ikki komin til eina innantóma Barbie-loysn við Helle Thorning Smith og einum Villy Søvndal, hvørs kumpass nú bara flytir seg eftir stjórnarvaldinum, sohvørt sum gamli ideologiski førningurin verður tveittur fyri borð á alljósum degi.

Hóast føroyingar halda seg kennast við nýggja danska forsætismálaráðharran, orsakað av giftu hansara við Sólruni, og stóru virðing hansara fyri landi okkara, so broytist onki í danska Føroyapolitikkinum av tí orsøk. Ein danskur ríkisleiðari, líkamikið hvaðani hann kemur í politisku flokksskipanini, hevur sum eitt av meginmálum sínum, at halda rimmarfast um soróptu ríkiseindina. At gøllhalda Grønlandi og Føroyum sum hjálondum í donskum yvirvaldsrætti. Løkke verður í so máta minst líka grótharður sum undanmenn hansara, kanska harðari, tí bara minsta liðið í verjugarðinum, kann tulkast og greinast aftur til føroysku connection hansara. Harvið er status quo í politisku viðurskiftunum landanna millum, og bólturin liggur framvegis í føvninginum á føroysku tjóðskaparrørsluni, sum aftur eigur at taka betri partar fyri seg, nú sambandshugsjónin so køvandi undirbrotlig fyllir almenna rúmið, við Fólkaflokkinum sum dyggari skorðu.

Fyri sjey árum síðani var eg til gallaveitslu hjá hennara hátign Margrethu Tórhilduri í Keypmannahavn. Lars og Sólrun vóru eisini við hóvið hetta kvøldið, og sum vit konverseraðu kundi eg ikki vita, at hetta var komandi ríkisleiðarin í landinum, tosað var við. Hann hevur verið ómetaliga knáur síðani, og hóast mikil politiskur divergensur er, so dámar mær so óluksáliga væl hesa Per Hækkerup týpuna av einum politikkara. Komi at hugsa um eina ferð hjá hesum framúr dugnaliga uttanríkisráðharra, í Bretlandi, har hann fyrst í seksti-árunum royndi at gera handilsavtalur um landbúnaðarvørur í regi av EFTA-felagsskapinum. Hann sløkti sær tostan á tiltiknu eingilsku pubbunum, ímillum fundirnar, og avísin Daily Mirror var hugtikin av hesum mikið karismatiska manni, og lýsti hann sum ein harðrendan víking og hóast tað ein ógvuliga menniskjansligan fýr. Spurdur hví hann so tíðum vitjaði ølstovurnar, segði hann somu avísini: "Tað er bara, táið tú lurtar eftir og svarvar við vanlig menniskju, at tú veruliga kanst hoyra sanna hjartasláttin hjá eini tjóð."

Væntuliga gerst Lars Løkke Rasmussen dønum ein góður forsætisráðharri. Hann er malin ígjøgnum politisku kjøtkvørnina fleiri ferðir, harvið kennir hann vandarnar betri enn nakar annar. Intellektið tykist vera í topp og orkan spríkir úr kropsskinninum. Hóast hann er nær tengdur fjølskylduni hjá mínum gamla sjórættarkennara frá Gjógv, sum ivaleyst hevði kunnað hugsað sær at brúkt embætið hansara til at loyst Danmark frá Føroyum ella øvut, so er tann missiónin óhugsandi og ómøgulig. Masterplanurin í ovastu skuffu hansara áleggur honum at byrja og enda sum forsætisráðharri í Danmark, Grønlandi og Føroyum. Einaferð róði Sosialurin framundir, at Atli skuldi gerast forsætisráðharri í Danmørk, hetta var í tíðini táið tað gekst illa í hond hjá Ankeri, og Axel Tórgarð yrkti hin tiltikna táttin um hendan møguleika føroyinga. Kanska fer onkur at rógva framundir tað sama, táið Løkke einaferð gevst í ríkisins metropoli, og skjóta hann upp sum løgmann í nýskipaðu republikkini, nú ongin politiskur leiðari í Føroyum fær stuðul frá fleiri enn 17%´um av landsins veljarum. Hóast hetta ikki hendir, so skulu tey bæði Sólrun altíð vera vælkomin í landinum, har ein so stórur partur av hjarta teirra liggur. Nú causeri´ið er endað, sum Jan heitti á meg um at skriva, um fjallmanni í Sáttarenni, sum nú gongur á ovastu og ytstu rókum Danmarkar, er bara eftir at ynskja forsætisráðharrahjúnunum tillukku og blíðan byr í ókomnum døgum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.